# Eg eri klárur

**Í tonkunum hevur hann longu gingið túrin fleiri ferðir, har hevur hann verið í flest hugsandi støðum. Men um ein mánað gerst dreymur veruleiki hjá 27 ára gamla vestmenninginum Johnny Joensen, tá skal hann ganga og klíva 7129 metra høga fjallið Baruntse. Tað er mín upptøkuroynd til Mount Everest, sigur Johnny**

FJALLAKLINTRARI

*Jón Brian Hvidtfeldt*



*27 ára gamli vestmenningurin Johnny Joensen er klárur til avbjóðingina. Av ovasta tindi á fjallinum Baruntse sæst yvir á Mount Everest*

Eg geri túrin, bara fyri meg sjálvan og ongan annan. Eg vænti ikki, at eg broytist, eydnast tað mær at náa toppinum á Baruntse, men eg verði glaður. Tá havi eg prógvað, at eg kann, og tá eri eg klárur til endaliga málið: Mount Everest. 27 ára gamli Johnny Joensen úr Vestmanna ivast ikki, tá hann greiðir frá um sínar ætlanir. Hetta eru mál, hann hevur sett sær fyri, og tey ætlar hann sær at náa.

Johnny fer í næstum avstað. Málið er 7129 metra høga fjallið Baruntse, sum liggur í nepalsku Himmalayafjøllunum. Av fjallatindinum sæst yvir á heimsins tak, Mount Everest. Fýra vikur eru settar av til túrin, sum byrjar heilt niðri í láglendinum, gangast skal um dalar og fjøll, men veruliga royndin kemur ikki, fyrr enn teir síðstu 2-3000 metrarnir skulu klívast í kava og ísi. Og tá komið er upp í 6000 metra hædd og tunna luftin sýgur alla megi úr kroppinum. Tunnu luftina sær Johnny sum sína størstu avbjóðing á túrinum.

Eingin sleppur upp á Mount Everest, uttan fyrst at hava roynt líknandi avbjóðingar, sum geva eitt viðmæli um, at tú ert egnaður til eina so stóra avbjóðing. Túrurin niðan á Baruntse skal geva Johnny sítt viðmæli – tað er hansara upptøkuroynd til Mount Everest.

Meðalstóri, tættbygdi vestmenningurin hevur fyrireikað seg væl. So væl, at hann kundi farið avstað í morgin, skuldi tað verið. Hann er klárur.

– Fysiski formurin er í lagi. Eg havi altíð vant nógv, bæði til kappróður og hondbólt, umframt at eg havi verið á ítróttarskúla og eitt ár í danska herinum, so fysisk venjing hevur ongantíð verið nakar trupulleiki hjá mær. Sjálvt um eg ikki skuldi henda túrin, so hevði eg helst vant kortini. Eg hevði kanska ikki gingið so nógv í fjøllunum, sum eg havi gjørt seinastu tíðina, men annars hevði eg vant tað sama. Næstsíðsta vikuskifti gekk hann við allari útgerðini úr Tjørnuvík til Vestmanna – tað tók seks tímar. Hann leggur seg eftir ikki at ganga sama túrin alt ov ofta, heldur ganga onkra staðni, hann ikki hevur verið fyrr. Og av og á fer hann ein túr til Vágarnar at ganga.

– Eg hevði næstan ikki fingið tíðina at ganga, um eg ikki vandi, greiðir Johnny frá. Tað er mín lívsstílur at vera í góðari venjing, leggur hann afturat.

Avgerðin um einaferð at standa ovast á Mount Everest varð tikin nakað áðrenn síðstu jól. Og hon stendur við. Men júst nú er tað túrurin upp á Baruntse, sum telur. Hann er tað týdningarmiklasta júst nú.

Eftir at Johnny í marts mánað var í bløðunum og greiddi frá sínum ætlanum, er ikki sørt, at áhugin fyri vestmenninginum er øktur. Fólk spyrja um túrin. Flestu eru positiv og eru spent uppá, hvussu tað fer at gangast, men onkra negativa viðmerking hevur hann eisini fingið.

– Tá eg onkuntíð havi fingið onkra negativa viðmerking, so vendi eg tað til nakað positivt. Eg sigi við meg sjálvan, at eg skal vísa teimum, og viljin gerst uppaftur størri, greiðir Johnny frá. Síðan eg í januar byrjaði fyrireikingarnar til túrin, havi eg ongantíð havt nakran »niðurtúr«. Eg havi sett tað í meg, at eg skal gjøgnumføra túrin, og soleiðis verður tað. Eg vil ofra alt fyri at røkka toppinum, sigur Johnny, og andlitsbráið skúgvar allan iva til viks. Maðurin meinar tað, hann sigur.

Eisini hevur hann roynt at fyrireika seg sálarliga til túrin.

– Tað besta er at fara ein langan túr í fjøllini, púra einsamallur, í ringum veðri. At fara túrar, sum eg slettis ikki tími, gevur mær eyka vilja og styrkir meg sálarliga. Eisini er týdningarmikið at vera greiður yvir, at túrurin er vandamikil. Tú skal vera klárur yvir tað, og hava tað við í tínum fyrireikingum, men tú mást ikki hugsa ov nógv um tað. Tú mást ikki hugsa ov nógv um, at tú møguliga gerst sjúkur, tá tú kemur í 6000 metra hædd og luftin er sera tunn, tí so verður tú sjúkur, sigur Johnny. Hann er greiður yvir vandan, men er ikki bangin.

– Síðstu mánaðirnar hevur túrurin malið í høvdinum alla tíðina. Eg hugsi um hann, frá tí at eg fari upp um morgunin, til eg fari í song um kvøldið. Í mínum tonkum havi eg gingið niðan á Baruntse fleiri ferðir, og nú gleði eg meg bara til at sleppa avstað, greiðir Johnny frá.

Um tríggjar vikur fer Johnny til Danmarkar, og síðan gongur leiðin til Nepal. Umframt vestmenningin skulu 11 danir við á ferðina, níggju menn og tvær kvinnur. Gongst sum ætlað verður hann burtur í fimm vikur.

– Hetta verður so mín frítíð í ár – hon verður helst ikki sum hjá teimum flestu, men eg fari at njóta hana, sigur Johnny. Fýra systkin eru tey, og Johnny leggur skemtandi afturat, at hann nú fer at ganga upp í somu hædd, sum systurin, sum er flogterna við Atlantic Airways, hevur sítt arbeiðspláss – góðar sjey kilometrar omanfyri vatnskorpuna.

Foreldur og systkini hava eisini verið ein góður stuðul síðstu mánaðirnar.

– Familjan hevur stuðla væl. Tey noyðast at stuðla mær í tí, tí tey vita jú, at eg fari kortini, sigur Johnny. Tey eru greið yvir, at tað er vandamikið, men eg haldi, at tey eru ikki í iva um, at eg nokk skal klára tað, leggur hann afturat. Eisini hevur hann fingið mostir sína at binda føroysk undirklæði og handskar til túrin. Tey skulu verma, tá kuldin seinasta teinin niðan á tindin kemur niður um 25 kuldastig.



*Fyri at klára niðan á 7129 metra høga fjallið Baruntse, krevjast serlig klæði og onnur útgerð. Útgerðin hjá Johnny Joensen til henda túrin kostar útvið 30.000 krónur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað sæst tíðuliga, at Johnny gleðir seg. Eyguni glógva, tá hann greiðir frá um túrin, um tað nógvu og dýru útgerðina, sum hann hevur útvegað sær, og um sjálvt fjallið Baruntse, sum hann í næstum skal læra at dansa við.

– Tá eg standi á toppinum á Baruntse, síggi eg beint yvir á Mount Everest, eg síggi at kalla alt fjallið, greiðir Johnny frá, og tað er, sum hann eitt sekund longu stendur har. Hann skal hava bæði mynda- og upptøkutól við sær, og myndin av Johnny í 7129 metra hædd, á ovasta tindi á Baruntse-fjallinum, við Mount Everest í baksýninum, er at kalla longu tikin.

Hann greiðir frá, hvussu trupult tað er at útvega sponsorar til ferðina, sum tilsamans fer at kosta honum 70.000 krónur, og leggur afturat, at tað hevur verið strævnari at fáa pengar til vega, enn tað hevur verið at gjøgnumført fysisku venjingina. Tó hava pengarnir ongantíð verið forðingin, tí frá fyrsta degi setti Johnny sær fyri, at klárari hann ikki at gjalda alt, so fór hann í bankan at biðja um lán.

Gongst sum ætlað, verður Johnny aftur í Føroyum í november. Røkkur hann sínum máli hesaferð, fer hann at fyrireika túrin niðan á Mount Everest.

– Klári eg niðan á Baruntse, so havi eg klárað fyrsta bitan. Eg veit, at tað verður hart, ræðuliga hart, men í mær sjálvum veit eg eisini, at eg klári tað. Avbjóðingin verður tann sera tunna luftin, men eg skal klára tað. Tað havi eg sett mær fyri, sigur vestmenningurin, hvørs dreymur er einaferð at standa á heimsins taki.



*Túrurin niðan á Baruntse er einasta eg hugsi um. Í tonkunum havi eg longu gingið hann fleiri ferðir. Nú eri eg til reiðar at fara avstað, sigur Johnny Joensen*